gult cyan magenta svart

Ansni og skapan

MENTAN: Ísta›in fyri at definera naka› ávíst sum mentan kunnu vit heldur minna hvønn annan á tann subjektiva partin vi› ansni og skapan, sum bert vit sjálv hava ábyrgd av, tey vi›kvomu sporini frá farnum ættarli›um og ta› ney›uga samskifti› um, hvat i› er t‡dningarmiki› — og hví

Birgir Kruse

Fyrst vil eg siga tillukku vi› formanssessinum í Mentanargrunni Landsins. Hvør er tín bakgrund, tá vit hugsa um henda sess?

Takk fyri, Birgir. Ta› mentanarliga hevur altí› havt mín allarstørsta áhuga - serstakliga bókmentirnar, vísindini og filosofiin. Mín bakgrund annars? Sí›ani august 1988 hevur Føroya Fólkaháskúli - yrkisliga og arbei›sliga - veri› mítt eitt og alt. Eg vóni, at tær royndir, eg havi fingi› í hesum starvi, at var›veita og menna Háskúlan, eisini kunnu ver›a mær til gagns í slíkum uppgávum, sum Mentanargrunnurin ber í sær. Nevndararbei›i av hesum slag er ofta kontant og pappírsligt, men sí›st og seinast so sn‡r ta› seg eisini um at samskifta vi› nógv ymisk fólk um nógv ymisk ting, royna at sko›a eitt vet út í framtí›ina og at taka ábyrgd av egnum avger›um.

Vi› lóg er gamli Mentunargrunnur Føroya Løgtings lagdur ni›ur, og n‡ggi Mentanargrunnur Landsins tekur vi›. Hvør er munurin á hesum bá›um grunnum?

Tann gamli grunnurin virka›i vi› stø›i í eini regluger›. Nú er ta› Løgtingslógin frá 17. mai og kunnger›in frá 21. september 2000, sum áseta karmar, krøv og heimildir. Bæ›i í tí gomlu regluger›ini og í n‡ggju lógini ver›ur sta›fest, at endamál grunsins er "at sty›ja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og mentanarmálum." Men lógin leggur afturat "bæ›i hjá leikum og lærdum". Og tá lógin eisini leggur dent á, at nevndin skal hava "brei›a samfelagsliga og mentanarliga umbo›an" so bo›ar hetta frá einum ynski um, at nevndin skal hugsa og virka á tí brei›ast møguliga grundarlagnum. Samtí›is ásetur kunnger›in, at nevndin skal meta um listarlig og faklig dygdarey›kenni og sostatt skal grundgeva -estetiskt og innihaldsliga, gangi eg útfrá - fyri øllum avger›um. Eisini ver›ur lagt upp til eina grei›ari ra›festing: starvslønir, íverksetanir (serstakliga fyri ung listafólk) og verkætlanir í fyrsta umfari - og sí›ani stu›ul til útgávur av ymiskum slagi. Alt hetta er lættari sagt enn gjørt - og ta› skal gerast.

Kann ein siga, at henda avger› ber bo› um eitt n‡tt mentanarhugtak, ella mentanars‡ni, her á landi?

Ein livandi mentan er pr. definitión altí› í broyting, men hinvegin krevst óiva› anna› og meir enn løgtingssamtyktir og nevndaravger›ir fyri at broyta mentanars‡ni› -tíbetur. Spurningurin er, um ta› yvirhøvur er naka›, sum vit kunnu kalla eitt "føroyskt mentanars‡ni", og um ta› eigur at vera eitt slíkt?

Tú bert ongan ótta fyri, at n‡ggi grunnurin leggur upp til meiri professionellar umsøkjarar og útilokar t. d. fólksligu mentanina?

Teir fíggjarligu karmarnir eru trongir, og nevndin skal grunda sínar avger›ir í kvalitetsmetingum. Tískil kann ta› vera eitt vandamál, at ta› í summum førum ver›ur lættari hjá nevndini at velja ta› professionelt snøgga, men kanska grunna, framum okkurt livandi og n‡skapandi, men sum at síggja til virkar óruddiligt ella ribbaldsligt. Ta› er einki einfalt svar til henda spurning. Hetta er naka› sum setir krøv til nevndarlimirnar um bæ›i kritiskt innlit, hugflog og ví›skygni. Annars fer fram ein professionalisering innan øll mentanarøki í dag, eisini innan ta fólksligu mentanina, og ta› óansæ›, hvønn politikk, grunnar og myndugleikar hava.

Mong plaga at all‡sa - definera - hugtaki› mentan. Og mong eru bo›ini. Hvussu vildi tú all‡st hugtaki› mentan?

Ja mong eru bo›ini; sambært Encyclopædia Britannica eru ta› í minsta lagi 165 definitiónir av mentanarhugtakinum. Hvør í sínum lagi eru hesar definitiónir rímiligar, men tá i› av tornar eru tær ikki nøktandi allíkavæl. Eg skal ikki koma vi› nøkrum íkasti til hesa definitiónsrúgvuna, men heldur vi› einari mynd: Mentanin er sum ein søga, i› fortelur seg sjálva, og sum dregur fólk og fæ vi› sær í søgumeldrinum. Okkara leiklutur sum menniskju er tó ikki læstur og loka›ur. Vit kunnu leggja uppí og ríka hesa annars óst‡riligu søguna vi› máli, myndum og virksemi ella vit kunnu, í líkasælu t. d., viska spor burtur og oy›ileggja óbøtilig vir›i. So ísta›in fyri at definera "mentan" kunnu vit heldur minna hvønn annan á tann subjektiva partin vi› ansni og skapan, sum bert vit sjálv hava ábyrgd av, tey vi›kvomu sporini frá farnum ættarli›um og ta› ney›uga samskifti› um, hvat i› er t‡dningamiki› - og hví.

Rói Patursson er forma›ur í n‡ggja Mentanargrunni Landsins, me›an Hanus undir Leitinum, sum var forma›ur í gamla Mentunargrunni Føroya Løgtings, heldur fram sum næstforma›ur í n‡ggja grunninum

Rói Patursson f. 1947 er mag.art. í heimspeki og sí›ani 1988 stjóri á Føroya Fólkaháskúla. Umframt at hava fingi› M. A. Jacobsens vir›islønina, hevur hann sum higartil einasti føroyingur fingi› fullu Bókmentavir›isløn Nor›urlandará›sins. Vir›islønin var› latin í 1986 fyri yrkingasavni› "Líkasum", i› kom ári› fyri. Í n‡ggja Mentunargrunni Landsins er Rói Patursson forma›ur, me›an forma›urin í gamla Mentunargrunni Føroya Løgtings, Hanus undir Leitinum, heldur fram sum næstforma›ur. Hinir nevndarlimirnir í Mentunargrunni Landsins eru: Urd Johannesen, Ey›un Johannessen og Kirsten Brix. Skrivari er Paulivar Andreasen og adressa grunnsins er Tórgar›sgøta 42, 100 Tórshavn

Hvørjar eru upphæddirnar, Mentanargrunnur Landsins hevur at arbei›a vi› beint nú og so tey komandi árini?

Til at brúka í 2001 eru játta›ar 3 milliónir danskar krónur í føroyskum se›lum. Eg havi skilt ta› so, at tey komandi árini er ætlanin, at henda játtan skal veksa vi› eini hálvari millión árliga.

Hvussu ver›ur grunnurin umsitin?

Grunnurin ver›ur stjórna›ur av eini nevnd vi› fimm limum. Henda nevnd skal semjast um gjøllari arbei›sreglur, sum sí›ani skulu gó›kennast av landsst‡rismanninum. Annars umsitur nevndin játtanina sjálvstø›ugt og óheft av politikarunum. Eina fer› um ári› ver›a kunnger› og vi›tøkur í grunninum eftirmett av mentamálast‡rinum og nevndini í felag. Samla›a virksemi› hjá grunninum skal so eftirmetast tri›ja hvørt ár.

Hvussu mangir fundir hava vanliga veri›?

Vanliga hava fimm til seks árligir fundir veri›. Eg rokni vi›, at ta› ver›a tíggju til tólv um ári› í framtí›ini - minst.

Hvussu mangar umsóknir koma vanliga inn?

Í 1998 komu heilt nágreiniliga 194 umsóknir, í 1999 var tali› 234 og higartil í ár eru komnar 190 umsóknir. Eisini her rokni eg vi›, at tali› á umsóknum fer at vaksa, serstakliga eftir teimum mungó›u starvslønunum.

Um ein hevur hug at royna n‡ggja møguleikan at fáa starvsløn, heilt upp í tr‡ ár, hvør er so mána›arliga lønin í krónum og oyrum?

Starvslønin svarar í upphædd til læraraløn, sum er á lønarstigi 21, stig l - heilt nágreiniliga vil ta› siga 17.876,26 kr um mána›in.

Hvussu ver›ur hetta vi› starvsløn gjørt av? Hvør kann og hvussu?

Eg ímyndi mær, at henda avger› ver›ur grunda› á eina dygga vi›ger› og eitt rei›iligt kjak millum teir fimm skilagó›u nevndarlimirnar. Øll, sum takast vi› mentanarligt virksemi - ta› kann vera skrivligt, listaligt ella fakligt - og sum vilja hava arbei›sná›ir í eitt ávíst tí›arskei›, kunnu søkja. Ta› er so upp til nevndina at meta um, at velja og vraka. Allar avger›ir, bæ›i játtanir og frávísingar, skulu grundgevast og umsøkjarin skal kunnast um hesar grundgevingar.

Í samgonguskjalinum ver›ur sagt, at or› skal setast á ein føroyskan mentapolitikk. Ver›ur Mentanargrunnurin eitt ambo› í frábo›a›a almenna mentapolitikkinum?

Í tann mun Løgtingslógin um Mentanargrunn Landsins er eitt ambo› í ætla›um mentanarpolitikki er grunnurin eisini eitt ambo›. Annars er setningur grunsins ikki at reka aktivan mentanarpolitikk, men heldur at geva teimum virkisfúsu betri møguleikar og fríari ræsur. Í mun til tey skapandi, granskandi og mentanarliga aktivu fólkini er grunnurin passivt tilfeingi, sum vi› hugflog og kreativari orku kann umskapast til "mentan".

Hvussu fer grunnurin at l‡sa vi› stu›ulsmøguleikum og virksemi annars; nakra serliga virkisskrá, ella l‡singartiltøk? Heimasí›u eitt nú?

Vit fara at l‡sa væl og vir›iliga vi› teimum møguleikum sum eru. Her eru fleiri óvi›gjørdir spurningar enn, men heimasí›an ver›ur sjálvsagt eitt andlit grunsins úteftir.

Sum forma›ur í Mentanargrunni Landsins, hvørji rá› hevur tú til tey, sum hugsa um at søkja og ongantí› hava roynt ta› á›ur? Skulu tey fyrst fáa sær grannsko›ara, roknskaparlei›ara osfr?

Nei - ta› er ikki ney›ugt at fáa sær hvørki grannsko›ara ella roknskaparlei›ara. Men ta› er ney›ugt at l‡sa sínar ætlanir greidliga; sum sagt ver›ur eftirspurningurin óiva› størri enn útbo›i› - so onkursvegna má umsóknin hava sannførandi tyngd, men ta› er ómøguligt frammanundan at siga nágreiniliga, hvat ta› inniber. Byrjanarstø›i› er, at vit standa á berum - umsøkjari so væl sum játtandi nevnd.

Næsta ár ver›ur Listahátí› í Føroyum. Hvat kundi tu hugsa› tær at sæ› ella uppliva›?

Eg kundi hugsa› mær at sæ› okkurt eg aldrin hev›i vilja gloymt aftur og uppliva› okkurt, sum eg næstan ikki havi uppliva› fyrr.

Takk fyri práti› og gó›a eydnu framyvir!

Takk somulei›is - og takk fyri, at tit s‡na áhuga fyri hesum virkseminum.